Álit

í

løgtingsmáli nr. 116/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul (Eftirlit við lestrarvirkni, reglur um stuðul til skúlagjald til lestrarfyrireikandi altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands, norðuratlantsflokkur javnsettur við miðnám í Føroyum og hægri hámark fyri skúlagjald til útbúgving uttan fyri Norðurlond)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 16. mars 2021 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, saman við Studna.

Endamálið við uppskotinum er:

- At áseta greiðari reglur fyri eftirlit við lestrarvirkni og heimild til Studna at krevja studning afturgoldnan í ávísum førum
- At fáa til vegar heimild at veita skúlagjaldsstudning til føroyskar næmingar, sum taka 2 ár av gymnasialari miðnámsútbúgving á altjóða gymnasialari útbúgving uttanlands
- At fáa til vegar heimild at javnseta føroyskar næmingar, sum taka miðnámsútbúgving sum liður í norðurlendskum samstarvi, og sum lutvíst er staðsett í Føroyum, við aðrar miðnámsskúlanæmingar í Føroyum
- At broyta hámarkið fyri skúlagjald í sambandi við hægri lestur uttan fyri Norðurlond

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 25. mars 2021

Djóni Nolsøe Joensen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Jóhannis Joensen
Beinta Løwe Jacobsen	Bjarni Kárason Petersen	Heðin Zachariasen
	Edva Jacobsen	